


Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# Jugoslavia dysturin útsettur

*Í gjár boðaði FSF frá, at dysturin móti Jugoslavia, sum ætlandi skuldi vera komandi mikudag, verður av ongum*


*Nú er greitt, at talan bert verður um ein dyst hjá landsliðinum í hesum umfarinum*

Jákup Mørk

Sum nevnt í blaðnum í gjár, og í grein í Internet-Sosialinum, sum er prentað niðanfyri, var sera ivasamt, hvussu fór at verða við dystinum.

At byrja við vóru tað trupulleikar við at fáa innferðarloyvi til føroysku pressuumboðini. Hetta kom tó í rættlag mánadagin, men spurningurin var framhaldandi, hvørt tað var ráðiligt at fara til Jugoslavia, nú politiska støðan í landinum er somikið spent.

### Tríggir møguleikar

Ísak Mikladal, aðalskrivari hjá FSF sigur, at Fótbóltssambandið í gjár varð kunnað um, at dysturin nú er útsettur, og at landsliðsferðin sostatt bert verður til tann eina dystin í hesum umfarinum. Sama er galdandi við dystinum millum Jugoslavia og Russland, sum eftir ætlan skuldi verið leiktur mikudagin.

Nær dysturin verður ásettur at leika, er ikki endaliga greitt enn, man talan er um trígjar møguleikar, sum í løtuni eru opnir. Sambært altjóða fótbóltskalendaranum, sum allir landsdystir nú verða lagdir eftir, er møguleiki at leika dystin 15. november, 14. februar ella 25. apríl. Frá einum føroyskum sjónarhornið er 25. apríl helst best hóskandi dagurin, tí leikarar okkara tá aftur eru komnir í gongd. Hinvegin er februar mánaður helst ringast hugsandi tíðin hjá okkara.

Ísak Mikladal vónaði sjálvsagt, at føroyska ynski um ein dyst í apríl mánaði fór at verða eftirlíka, men tá blaðið fór til prentingar, var hetta enn ógreitt.

### Óvist við heimferðini

Heldur ikki var í gjár greitt, hvussu verður við heimferðinin hjá landsliðnum eftir dystin í Sveis.

Í sambandi við landsdystirnar hevði Atlantic Airways selt ferðaseðlar til áskoðarar. Íroknað hesum var uppihald í Sveis, meðan landsliðið er í Jugoslavia, og skuldi føroyaska flogfarið so koma eftir bæði leikarum og áskoðarum hósdagin 12. oktober. Teir áskoðarar, sum

Beint fyri døgurðatíð í gjár segði Ísak Mikladal, at teir í løtuni arbeiddu við hesum spurningi, men júst hvussu han fór at verða loystur, visti hann ikki at siga.

Beint áðrenn blaðið fór til prentingar, fingu vit orðið á Magna Arge, stjóra í Atlantsflog. Hann greiddi frá, at Atlantic Airways heldur fast um upprunaligu ætlanina, soleiðis at farið verður eftir áskoðarunum hóskvøldið.

Landsliðið fer allarhelst úr Zürich til Keypmannahavnar tíðliga sunnumorgunin, soleiðis at teir koma við morgunflogfarinum hjá Atlantsflog sunnudagin.



*Teir áskoðarar, sum hava rindað fyri uppihald í Sveis fram til hósdagin komandi viku, verða tó ikki snýttir, tí Atlantic Airways heldur fast um upprunaligu ferðaætlanina*

# Landsliðið fer ikki til Jugoslavia

*Møguliga verður HM undankappingardysturin í staðin spældur á uttanveltaðum vølli, og møguliga verður hann ikki spældur fyrrenn í apríl komandi ár*

Føroyska fótbóltslandsliðið fer ikki til Jugoslavia at spæla HM undankappingardyst komandi mikudag. Fótbóltssambandið fekk boðini klokkan 15.30 mánadagin um, at FIFA ikki heldur tað vera ráðiligt at fara til Jugoslavia. Politisku umstøðurnar eru so mikið ótryggar, at FIFA hevur gjørt av, at landsdysturin hjá jugoslavum ímóti Russlandi komandi leygardag, og landsdysturin ímóti Føroyum mikudagin í komandi viku, ikki kunnu spælast í Beograd.

Um dysturin hjá Føroyum verður spældur nú, og hvar hann møguliga verður spældur, var ikki greitt, tá vit seint seinnapartin mánadagin tosaðu við Ísak Mikladal, aðalskrivara í FSF.

– Vit hava akkurát fingið boðini um at okkara ferðalag ikki skal fara úr Sveis og til Jugoslavia sunnudagin. Í prátinum við FIFA hevur møguleikin verið nevndur, at dysturin skal spælast á uttanveltaðum vølli. Mest upplagdi møguleikin í tí sambandinum verður mettur at vera, at dysturin verður spældur í Sveis, tí okkara landslið skal spæla har leygardagin, men hetta skulu vit tosa nærri um seinni í vikuni, sigur Ísak Mikladal.

Mikudagin í komandi viku skal Sveis spæla í Slovenia.

### Fleiri spurningar skulu svarast

Tað er ikki bara sum at siga tað at flyta ein landsdyst úr einum staði og til eitt annað. Ein rúgva av spurningum skulu greiðast, áðrenn tað er greitt, um hetta ber til, og spurningurin er, um tað er nóg mikið av tíð at fáa spurningarnar svaraðar, tá skotbráðið er so stutt.

Mest einfalda loysnin hevði kanska verið, at jugoslavar komu henda vegin í komandi viku, og at føroyingar so fóru niður til Jugoslavia komandi summar. Hetta er kortini ikki bara sum at siga tað, tí dystirnir eru samantvinnaðir, soleiðis at talan er um tveir dystir á útivølli ella heimavølli hvørja ferð. FSF hevur sagt FIFA, at tað fer ikki at bera til at spæla í Føroyum í komandi viku.

Ein annar spurningur er ferðingin og uppihaldið. Um dysturin verður fluttur t. d. til Sveis, so skal FSF fáa húsarúmd fyri landsliðnum í fýra dagar eyka í Sveis, jugoslaviska landsliðið skal fáa húsarúmd í Sveis, og øll tey, sum ferðast til og frá einum sovornum dysti – dómarar, eygleiðarar, tíðindafólk og so ógvuliga mong onnur – skulu broyta ætlanir, sjónvarpsupptøkuliðini og lýsingarfeløgini skulu broyta ætlanir, og soleiðis kundu vit hildið á at nevnt viðurskifti, sum fyri langari tíð síðani eru komin í fastar karmar, og sum nú skulu loysast av nýggjum so at siga her og nú.

### Fíggjarligi parturin

Um landsdysturin verður útsettur, so verður hann spældur 25. ella 26. apríl komandi ár. Hetta eru fyrstu dagarnar, sum eru leysir í europeiska fótbólts álmanakkanum.

Føroyska landsliðið verður ikki illa fyri í apríl komandi ár, tí tá hava teir longu verið í Luksemburg og í Russlandi.

Fyri FSF verður tað ein fíggjarligur smeitur, um landsliðið skal tvær ferðir suður í Europa í staðin fyri bara eina ferð.

– Vit hava nevnt hetta fyri teimum í FIFA. Teir skilja væl ta síðuna av søkini. Vit skulu venda aftur til fíggjarliga spurningin seinni. Um talan verður um tvær ferðir suður eftir, so ivist eg ikki í, at FIFA fer at endurrinda okkum meirkostnaðin, sum vit fara at hava av nýggju støðuni, sum vit ongan lut eiga í, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum.

Í Ítróttarsosialinum týsdagin verður sagt, at føroyska pressan mánadagin á middegi ikki hevði fingið visa til Jugoslavia. Hetta kom upp á pláss tíðliga seinnapartin mánadagin. Seinni sama dag tók málið eina nýggja vend, og nú er ikki neyðugt at hava visa til Jugoslavia. Tað er púra greitt, at landsliðið ikki fer niður hagar.

JH



# Jákup var í essinum

*Føroyski landsliðsmálverjin varð valdur til dagsins spælara, tá undirmannaða Herfølge tapti á heimavølli ímóti FCK*



*Serliga í fyrra hálvleiki stóð Jákup Mikkelsen seg væl, og í fleiri førum var talan um rættar stórbjargingar frá hansara síðu*

Jákup Mikkelsen er á aldukambinum, nú føroyska landsliðið fer av landinum at spla ein ella tveir dystir. Síðani summarsteðgin hava avrikini verið støðug, og mánakvøldið varð krúnan sett á verkið.

Herfølge hevði vitjan av FCK – Todi Jónsson var ikki við, tí hann sat skaddur eftir í Keypmannahavn – og Jákup Mikkelsen varð av hyggjarunum á TV3+ sjónvarpsrásini sagdur at vera besti maður á vølli. Rættuliga stór semja var um ta avgerðina.

### Bjargaði brotssparki

Tað var harmuligt fyri fótbóltsdystin, at Herfølge longu eftir tíggju minuttir misti ein mann. Harmurin gjørdist tvífaldur, tá tað vísti seg, at reyða kortið hjá dómaranum ikki var, sum tað skuldi vera. Peter Frank, sum spældi fyri fyrstu ferð, eftir at hann var komin aftur úr AB og til Herfølge, elti púra leysan Suma. Spælararnir stríddust, Suma fór um koll, og dómarin bríkslaði. Fyri ryggskump, segði dómarin aftaná dystin, men sjónvarpsmyndirnar vístu, at hann hevði mett skeivt.

Og so var tað, at Jákup Mikkelsen fór undir sítt stórspæl. Hann tveitti seg til høgru fyri seg sjálvan og bjargaði brotssparkinum.

### Stórspælið

– At eg bjargaði brotssparkinum gjørdi, at eg kom væl inn í dystin. Teir høvdu nógv spæl og nógvar møguleikar, so eg hevði onga orsøk at keða meg, segði Jákup Mikkelsen eftir dystin.

Og Jákup stórspældi. FCK spælararnir stóðu næstan í bíðirøð fyri at royna seg ímóti málinum, men føroyski landsliðsmálverjin helt tætt. Hann bjargaði við hondunum, fótunum, lørunum og eina ferð við høvdinum.

Herfølge brúkti nógv at spæla bóltin aftur til málverjan, og hann megnaði sum ein annar útispælari at spæla skilagott frá sær, sjálvt um hann fleiri ferðir var rættuliga kroystur.

### Harmaðist

Í 2. hálvleiki eydnaðist tað FCK at fáa hol á. Og Jákup Mikkelsen illneitaðist inn á seg sjálvan, at hann ikki hevði vart fyri fyrra málinum:

– Teir fingu fríspark einar nítjan metrar úr málinum. Manngarðurin stóð rætt, eg sá flata skotið, eg tveitti meg rætta vegin, men bólturin fór í málið. Tað iðri eg meg ógvuliga nógv um.

Kundi tú havt bjargað?

– Avgjørt. Eg ætlaði at halda bóltinum, sum so fór undir armarnar og inn um strikuna. Tá eg nú hugsi aftur á dystin, so átti eg at havt blokerað hann út til horna, sigur Jákup Mikkelsen, sum mánakvøldið var harmur um, at Todi Jónsson er skaddur og tískil ikki verður við í landsliðsferðalagnum. Jákup Mikkelsen og hinir útisetarnir í Danmark og Noregi fara í kvøld niður til Sveis, har teir í Zürich fara at hitta teir, sum fara úr Føroyum við Atlantsflog.

– Tað er altíð hugaligt at hitta vinmenninar á landsliðnum, og vónandi fara vit at vísa eitt gott avrik, sjálvt um vit allir fara at sakna Toda Jónsson, sigur Jákup Mikkelsen.

JH

# Todi hevur givið avboð

*Fremsta føroyska álopsessið verður ikki við á ferðini til Sveis, tí ein skaði í lærinum heldur honum burtur frá fótbólti í tvær ella tríggjar vikur*

Tað kom sum ein stórur skelkur fyri spælararnar og venjaran, tá tað undan dystinum millum Herfølge og FCK gjørdist greitt, at Todi Jónsson er skaddur. Seint seinnapartin mánadagin setti Todi Jónsson seg í sambandi við Allan Simonsen og boðaði honum frá, at tað ikki ber honum til at fara við til Sveis.

– Undir venjing sunnudagin fekk eg ein vøddaskaða í lærinum. Hann er so mikið álvarssamur, at eg rokni við at vera noyddur at binda frið frá fótbóltinum í tvær ella tríggjar vikur, sigur ein harmur Todi Jónsson úr Keypmannahavn.

Todi varð skaddur frammanfyri á lærinum, tá hann var í Føroyum og spældi landsdystin ímóti Slovenia. Nýggi skaðin hevur einki við tann skaðan at gera.

### Spennandi í Sveis

Tá vit tosaðu við Toda hevði hann akkurát hugt at dystinum í Herfølge. Hann helt, at Jákup Mikkelsen hevði spælt ein framúr góðan dyst. Todi førddist sjálvandi um, at FCK fekk øll stigini, men hann helt samstundis, at tað er hart at vera málmaður.

– Jákup gjørdi bara eitt mistak í øllum dystinum, og tað kostaði eitt mál. Alllir hinir á vøllinum kunnu gera mistøk, uttan at tað beinleiðis kostar nakað serligt.

Todi Jónsson harmast um, at hann ikki sleppur við landsliðnum til Sveis:

– Eg rokni við, at tað verður ein sera spennandi avbjóðing. Sveisararnir fara ivaleyst at kenna trýst á sær at mynda spælið, og eg ivist onga løtu í, at tað ikki fer at eydnast okkarra monnum at fáa møguleikar fyri kontraálopum, heldur Todi.

Einki er at ivast í, at venjarin, spælararnir og allir hinir í hópinum harmast um avboðið hjá Toda, tí tað er júst hann, sum er besti maður í snarálopunum.

Landsliðsvenjarin gjørdi mánakvøldið av at senda boð eftir Jákupi á Borg, sum ikki hevur verið í hópinum tær seinastu ferðirnar.

JH


*Todi Jónsson hevur aftur fingið skaða í lærið, og hevur tí givið avboð til landsdystin móti Sveis*

# Stjørnuleikarar

*Tað vóru stór nøvn, sum føroyingar skuldu tikist við í Beograd*

Jákup Mørk

Tað eru ikki hissini leikarar, sum føroysku landsliðsleikararnir eftir ætlan skuldu takast við móti Jugoslavia

### Toppurin av Europa

Jugoslaviski landsliðsvenjarin, Ilija Petkovic, hevði tikið út 22 leikarar til dystirnar móti russum og føroyingum, sum nú kortini verða av ongum. Talan er í fleiri førum um leikarar, sum teljast millum teir bestu í Europa.

Fleiri leikarar umboða lið, sum í vár gjørdust meistarar í bestu útlendsku deildunum, og eitt nú eru so at siga øll tey italiensku oddaliðini umboðað í hópinum. Tað kann tykjast torført at taka nakran einstakan stjørnuleikara framum, men eitt nú kunnu nevnast tey bæði álopsessini, Predrag Mijatovic og Savo Milosevic, sum báðir hava verið toppskjúttar í bestu sponsku deildini, men sum nú spæla í Italia.

Hópurin sær annars soleiðis út: Málverjar eru Zeljko Cicovic UD de Las Palmas, Aleksander Kocic Reyða Stjørna og Zarko Lucic FC Buduenost. Verjuleikarar eru Zoran Mirkovic FC Fenerbache, Sinisa Mihajlovic S.S. Lazio, Goran Dorovic Celta de Vigo, Nenad Sakic Sampdoria UC, Miroslav Dukic CF Valencia, Ivan Dudic SL Benfica, Goran Bunjevcevic Reyða Stjørna, Dejan Stefanovic FC Vitesse. Miðvallarar eru Slavisa Jokanovic Deportivo La Coruna, Dejan Stankovic S.S. Lazio, Nikola Lazetic FC Fenerbache, Ljubinko Drulovic FC Porto, Sasa Ilic FK Partizan, Predrag Dordevic Olympiakos og Dragan Sarac FK Austria Wien. Áleyparar eru Predrag Mijatovic Fiorentina AC, Savo Milosevic Parma AC, Darko Kovacevic Juventus FC og Mateja Kezman úr PSV Eindhoven.